# Fimm ár síðan Inn læt upp við Streymin

Tað hevur verið ein týðandi vøkstur í søluni av matvørum síðan á vári í 2002, tá fyrsti Inn handilin læt upp við Streymin. Á leið 10. hvør mjólkarpakki, ið verður seldur í Føroyum í dag, fer um ein av handilsdiskunum hjá Inn. Handlarnir, ið eru í Klaksvík, við Streymin og í Havn, hava allar opið mánadag til leygardag frá kl. 8–22.00. Inn handlarnir eru stórir og hava eitt breitt úrval av gerandisvørum. Hesi seinnu árini er parturin av sonevndum non-food vørum, ið umfatar ymsar brúks- og gávulutir, vaksin rættiliga nógv. Eisini frukt og grønmeti er ein vørubólkur, ið hevur staðið fyri týðandi vøkstri.





















